



Kavarar og onnur, sum hava við leitingina at gera. Ovast f.v. Mathias Lassen, stigtakari









Myndir frá leitingini við Lopranseiði um vikuskiftið

# gav úrslit

og kavingin um vikuskiftið er liður í kanningararbeiðinum. Serliga eru vónir um at finna goturstykki, kanónir, og kanska er úrslitið um vikuskiftið ábending um júst hetta.

## Westerbeek

Søgan um Westerbeek er í stuttum henda; Westerbeek fór úr Eysturindisku oyggjunum við umleið 90 monnum umborð, við kós móti Hollandi. Ódnarveður brestir á, og seglskipið fer á land vestanfyri Suðuroynna, nakað sunnanfyri Lopranseiði, 2. september í 1742.

Søgurnar hava livað um hendingina, og tað verður sagt, at menn bjargaðu sær eftir mastrunum uppá røkur í bjørgunum. Teir fáa bjarga sær á enda hátt, men tó druknaðu 10 mans og ein lat lív í bjørgunum.

Eittnú hevur verið tosað um eftirkomarar eftir monnum av Westerbeek, og tað er ein síða av søguni, ið Mathias Lassen eisini hevur verið áhuagaðu í, tá hann hevur granskað hedningina og søguna

Tað eru serliga kanónir, goturstykki, ið vónur eru um at finna, nú leitað verður eftir vraklutum. Westerbeek hevði tvær kanónir úr messing, 20 úr jarni, umframt akker úr jarni.



